# Havið sang yvir teimum gleðiljóð


Ein stórur svartur hvalur hoyrir sjálvandi við til eina verkætlan um havið

**Havn:** Fyrr í hesum mánaðinum høvdu børnini og starvsfólkini á barngarðinum við Landavegin eina verkætlan, sum snúði seg um havið.

Børnini luttóku sera virkin í arbeiðinum, bæði innanveggja og uttandura.

Tey vóru millum annað í Sandagerði og fangaðu har alskyns sløg av tí, sum livir í sjónum.

Var veðrið hinvegin ikki til vildar, vóru tey inni og teknaðu og litaðu ymiskt.

Alt hetta miðaði eftir at læra børnini um tað, sum livir og rørir seg undir sjóvarmálanum. Samstundis miðaði hetta fram ímóti eini framsýning, sum varð hildin seinasta fríggjadag fyri foreldrunum.

Her var nógv gjørt burtur úr. Til ljóðið av tosandi hvalum vóru myndir, livandi sjódýr, ein stórur hvalur og mangt annað at síggja.

Eitt frálíkt tiltak, sum hugtók og gleddi børnini, og sum tey seint fara at gloyma.

sb.


Tað er ikki á hvørjum degi, at børnini fanga ein livandi krabba


Sandágerði er eitt gott stað til børnini at stuttleika sær í


Greitt verður frá teimum ymisku gággusløgunum


Børnini fingu nógv nýtt at vita um havið og sluppu eisini at mynda tað


Ein balja við livandi djórum var við á framsýningini. Her vóru altíð børn at síggja


Framsýningin var væl skipað við troli og øllum tí sum hoyrir havinum til